**Mín hjartasorg er ein turkitrumla**

Mín hjartasorg er ein turkitrumla á tremur við tornandi kenslum, ið mala runt
til eg ikki havi hóming av, um eg skal flenna ella gráta
í øðini, brátt glað - so drukni eg meg í tárum.

Mín hjartasorg er ein heilivágur – lekir og rínur við
sum doyving – við spískari sproytu
betri enn elektrosjokk og sterkari enn valium.

Mín hjartasorg er ein guru – lærir meg at yppa øksl
eg føli onki – eri lammað
veittri og geispi at verðini.

Mín hjartasorg er eitt vælsignilsi í karmasós
við kleprutum hunangi og loyptum róma
kostirnir eru súrir, søtir og rotnir.

Mín hjartasorg er ein pílur - stingur seg inn í eygað
ein gravsálmur á repeat
ein svanur syngur solo - eyðkent og keðiligt.

Mín hjartasorg er eitt flogfar
bumbar meg aftur í tannáringaøld
*like a virgin* og ein lívstroyttur oldingi.

Mín hjartasorg er ein dýna
eg søkki niður – og hon vermir
sum ein knýttur nevi.

Mín kærleiki er eitt nýgrivið hol
og aldrin aftur
detti eg.

Jóhanna B. K. Thomassen

(Vencil 9, 2010)